# Hin fyrsta hvítusunnan

**Her prenta vit eina grein, sum ikki kom við á Hvítusunnu, men hon er eins aktuell enn.**
**Blðs.**

**Kjartan Stakksund**

Og tá ið nú hvítusunnudagurin er komin, vóru teir allir saman komnir á einum staði. Og tá kom brádliga eitt dun av himli, sum tá ið harðveður brestur á, og fylti alt húsið, sum teir sótu í. Og fyri teimum sýndust tungur líkasum av eldi, sum skildust sundur og settust á ein og hvønn teirra; og teir vórðu allir fyltir av Hinum Heilaga Anda og tóku at tala á øðrum tungumálum eins og Andin gav teimum at mæla. Men har vóru jødar búsettir í Jerúsalem, menn, ið óttaðust Guð, av øllum tjóðum undir himni. Tá ið nú hetta ljóðið hoyrdist, kom mannamúgvan saman, og henni varð dátt við; tí at teir hoyrdu, ein og hvør, teir tala á sínum egna máli. Og teir vórðu allir bilsnir og undraðust og søgdu: »Sí, eru ikki allir hesir, ið tala, Galileumenn? Hvussu ber tað tá til, at vit, ein og hvør, hoyra teir tala á okkara egna máli, sum vit eru føddir vð? Partar og Medar og Elamitar og vit, sum eru búsettir í Mesopotámiu, Júdeu, Kappadókíu, Pontus og Ásiu, í Frýgíu og Pamfýliu, Egyptalandi og Libyubygdunum við Kýrene, og vit Rómverjar, sum her hava setst niður, Jødar og proselýtar; Kretoyingar og Árábar, vit hoyra teir tala á okkara tungum um stórverk Guðs?« Men teir gjørdust allir bilsnir og vóru í døpurhuga og søgdu hvør við annan: »Hvat man hetta vera?« Men aðrir spottaðu og søgdu: »Teir eru druknir av søtum víni«. (Áp. 2,1-13)

Tað hevur verið ógvuliga undarligt hjá ápostlunum, tá teir upplivdu tað fyrstu hvítusunnuna á jørð, tá tað kom líkasum eitt dun av himni, sum tá ið harðveður brestur á, og fylti alt húsið sum teir sótu í, og tungur líkasum av eldi, settist á ein hvønn teirra, og teir tóku at tala á øðrum tungumálum, eins og Andin gav teimum at mæla.

Tá vit fylgja kirkjuárinum við teimum stóru hátíðunum, jól, páskir og hvítusunnu, so síggja vit tíðiliga Guðs frelsuætlan við mannaættini. Jólini, tá vit hoyra jólaboðskapin um tað lítla barnið í krubbuni í fjósinum í Betlehem, páskirnar, tá vit hoyra um Jesu líðing, deyða og uppreisn, og so nú hvítusunnan, tá Heilagi Andin kom niður yvir ápostlarnar í Jerúsalem.

Tíggju dagar undan hvítusunnu halda vit Kristi himmalferðardag. Hendan dagin tá Jesus fór heimaftur til Faðir Sín aftaná foldarlív, líðing og uppreisn Sína. Frelsisgerningur Hansara var fullførdur; Guð var nøgdur við offurið, tí reisti Hann Sonin upp aftur frá teimum deyðu, menniskjum til æviga rættvísi, samanber við 2. Kor. 5,21. Hetta er gleðiboðskapurin til mannaættina allar tíðir, tað er einki annað givið okkum menniskjum til frelsu enn tað, sum Guð við Syni Sínum hevur gjørt fyri okkum; og so tað veldigu broyting, at Jesus nú er allastaðni í senn. Hann er okkara millum. Hann er úti í heidningalondunum. Ja, Hann er við Heilaga Anda Sínum í Orðinum, soleiðis, at Andin sannførir okkum um hvørji vit eru. At vit eru syndarar, meðan Jesus er frelsarin. Meðan Hann gekk her á fold, var Hann staðbundin, nú er Hann við Orðið og Anda Sínum runt allan heimin sum áður sagt.

Alt hetta sýnir okkum hvussu ómetaliga høgt Guð elskar okkum menniskju. At Hann hevur givið okkum Sonin til frelsu og bjarging frá ævigum deyða (glatan) og tey menniskju, sum venda umt til Hansara, gevur Hann mátt til at liva lívið sum kristin menniskju her á jørð, og fáa øll kristin uppgávur í Guðs ríkis víngarði. Her kunnu øll verða við til at fremja Guðs ríki, soleiðis, at menniskju kunnu verða frelst.

Tá Guð frelsir menniskju, kemur alt at verða øðrvísi, enn tað var frammanundan. Alt verður í ljósglæmuni av tí, sum Guð gjørdi fyri okkum ígjøgnum Son Sín Jesus Kristus. Tey frelstu fáa nýggj áhugamál, nýggjar vinir, alt verður nýtt. Tað er, sum skrivað stendur: »Tí, um onkur er í Kristi, er Hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt!« (2. Kor. 5,17). Hetta er gerningur Heilaga Andans í dag eins og fyrsta hvítusunnudag.

## Guðs kirkja á jørð

Og tey hildu fast saman um læru ápostlanna og samfelagið og breyðbrótingina og bønirnar. Men ótti kom á eina og hvørja sál, og mong undur og tekin vórðu gjørd av ápostlunum. Men øll tey, sum trúðu, hildu saman og høvdu alt í felagi; og tey seldu ognir sínar og góðs sítt og býttu tað sundur millum øll, eftir tí sum ein og hvør trongdi. Og hvønn dag hildu tey sær samhugað støðugt í halgidóminum og brutu breyðið heima við hús og fingu føði sína við gleði og í hjartans einfaldi, og tey lovaðu Guði og høvdu yndi hjá øllum fólkinum. Men Harrin legði hvønn dag nøkur aftur at teimum, sum vórðu frelst. (Áp. 2,42-47)

Tey fyrstu kristnu verða kallað fyri tey gullkristnu, og bóru tey hetta navnið av røttum, tí tey komu at uppliva Jesu Krists uppreisnarkraft tær fyrstu páskirnar og síðani hvítusunnukraftina, tað sum hendi ápostlunum hina fyrstu hvítusunnuna, tá ið Heilagi Andin kom yvir tey við slíkari kraft, at tað vóru røddir frammi um, at teir vóru druknir av søtum víni. Tá steig Pætur fram saman við hinum ellivu, hevði upp rødd sína og mælti til teirra: »Tit, jødar, og allir tit, sum búgva í Jerúsalem, hetta veri tykkum vituligt, og gevið orðum mínum ljóð! Tí at ikki eru hesir menn druknir, soleiðis sum tit halda; tí at nú er eisini landsuðurstíð.« (Áp. 2,14-15).

Enn í dag eru hesar somu røddir at hoyra, at vit sum hava uppliva hesa somu uppreisnarkraft og hesa somu Heilaga Andans kraft, hevur gjørt, at vit hava mist vitið. Hetta er ein stór misskiljing. Tann, sum sigur slíkt, hevur ikki møtt Jesusi, sum sínum perónliga frelsara. Tann, sum hevur verið við krossin á Golgata, og har fingið syndanna fyrigeving, fær eisini Heilaga Andans gávu, soleiðis, at vitnisburðurin verður føddur í eins hjarta.

Tá man verður gripin av Kristusi, føðist ein lovsngur í eins hjarta. Tað var júst hetta sum hendi teimum fyrstu kristnu, tí kendu tey trongd til at koma saman í einum heilagum samfelagið, og har verða styrkt í trúarlívinum, ígjøgnum læru ápostlanna, breyðbrótingina og bønirnar. Samanber við Áp. 2,42. Hetta er lívsneyðugt enn í dag, um ikki kristinlív okkara skal verða vannrøkt. Tí Satan vil altíð tøla okkum við sínum sniðfundigu álopum á kristinlív okkara, hann eiga vit undir ongum umstøðum at undirmeta. Gera vit tað, verða vit taparar í kristinlívið okkara. Tí eiga vit hvønn einasta dag at gera brúk av Orðið Guðs og bønini, um vit ikki skulu verða rend um koll í trúarlívið okkara og av tí saman standa uttanfyri Guðs ríki ein dag, tí vit ikki vóru vakin.

Við tað, at tað heilaga samfelagið var kjarnin í lívið teirra fyrstu kristnu, kom tað at hava týdningarsamar fylgir, soleiðis sum skrivað stendur: Men Harrin legði hvønn dag nøkur afturat teimum, sum vórðu frelst. (Áp. 2,47). Hetta ger seg galdandi enn í dag. Tað verður ofta líknað við eldgløður. Vit vita fullvæl hvat hendir, um vit taka eldgløðurnar og raka tær burtur hvør frá aðrari, tá verður skjótt øskukalt, men raka vit tær saman, soleiðis at tær verða saman sjóðaðar, tá verður skjótt fjálgur logið. Mær tykir hetta verða ógvuliga beinrakið sagt um týdningin av at halda saman um trúðarlívið, soleiðis, at tað verður ein eind, og vit harvið verða varveitt inni hjá Jesusi, líka til okkara seinastu stund.

## Gerningur Heilaga Andans

Men Saul, sum enn froysti hóttir og manndráp móti lærusveinum Harrans, fór til høvuðsprestin og bað hann um bræv til Damaskus, til samkomuhúsið har, fyri at hann, um hann hitti nøkur, sum hoyrdu til »vegin«, menn ella konur, kundi føra tey í bondum til Jerúsalem. Men tá ið hann á ferðini var komin nær til Damaskus, ljómaði knappliga eitt ljós av himni um hann; og hann fell til jarðar og hoyrdi eina rødd siga við seg: »Saul, Saul, hví søkir tú at Mær?« Men hann segði: »Hvør ert Tú, Harri?« Og Hann svaraði: »Eg eri Jesus, sum tú søkir at. Men statt upp og far inn í staðini, og har skal tær verða sagt, hvat tú eigur at gera.« Men menninir, sum vóru í ferðini við honum, stóðu málleysir; teir hoyrdu fullvæl røddina, men sóu ongan. Og Saul reistist upp av jørðini; men tá ið hann lat eyguni upp, sá hann einki, og teir leiddu hann við hondunum og fóru við honum inn í Damaskus. Og tríggjar dagar sá hann einki, og hann hvørki át ella drakk. Men í Damaskus var ein lærusveinur, sum æt Ánanias, og Harrin segði við hann í eini sjón: »Ánanias!« Og hann segði: »Sí, her eri Eg, Harri!« men Harrin segði við hann: »Statt upp og far í ta gøtuna, sum kallast hin beina, og spyr í húsinum hjá Judasi eftir einum manni frá Tarsus, sum eitur Saul; tí, sí, hann biður. Og hann hevur (í eini sjón) sæð ein mann, sum eitur Ánanias, koma til sín og leggja hendurnar á seg, so at hann kundi fáa sjónina aftur!« Men Ánanias svaraði: »Harri, eg havi hoyrt av mongum um henda mann, hvussu nógv ilt hann hevur gjørt Tínum heilagu í Jerúsalem. Og her hevur hann í umboði frá høvuðsprestunum at binda øll tey, sum ákalla navn Títt.« Men Harrin segði við hann: »Far tú, tí at hesin maður er mær eitt útvalt ílat til at bera navn mítt fram fyri heidningar og kongar og Ísraels børn; tí at Eg vil sýna honum, hvussu mikið hann eigur at líða fyri navns Míns sakir.« Og Ánanias fór tá avstað og kom í húsið og legði hendurnar á hann og segði: »Saul, bróðir, Harrin hevur sent meg, Jesus, tann sum birtist fyri tær á veginum, sum tú komst, til tess at tú skalt fáa sjón tína aftur og verða fyltur við Heilagum Anda.« Og alt fyri eitt fell tað eins og skøl frá eygum hansara, og hann fekk sjónina aftur; og hann stóð upp og varð doyptur. Og hann fekk sær mat og styrknaði. Men hann varð nakrar dagar hjá lærusveininum í Damaskus. (Áp. 9,1-19).

Soleiðis virkar Heilagi Andin, tá ið Hann sleppur framat; Saul søkti at teimum kristnu, og helt at hann var á beinari leið við at søkja at teimum, tá er tað, at hann hoyrir eina rødd, sum sigur: »Saul, Saul, hví søkir tú at Mær?« Men hann segði: »Hvør ert Tú, Harri?« Og hann svaraði: »Eg eri Jesus, sum tú søkir at. Men statt upp og far inn í staðin, og har skal tær verða sagt, hvat tú eigur at gera.« (Áp. 9,4-6). Hetta er gerningur Heilaga Andans. Guð hevði brúk fyri Saul, tí var hann steðgaður har uttanfyri Damaskus; aftaná umvending sína fekk hann navnið Paulus, lív hansara kom at ligga eina heilt aðra leið eftir henda dag, hann sum áður hevði søkt at teimum kristnu, kom nú at elska tey, nú er tað honum ein hjartasak, hetta at menniskju mega koma til trúgv á tann Harra Jesus Kristus.

Ja, soleiðis kann Jesus broyta menniskju, og tað ger hann eisini í dag. Tú, sum lesur hetta stykkið, hvussu hevur tú tað mótvegis Jesusi. Um tú ikki, eins og Saul, søkir at teimum kristnu, so er tað tó neyðugt, at tú letur hann broyta títt lív, um tú ikki hevur gjørt tað áður. Jesus hevur brúk fyri tær í Sínum ríkis víngarði. Tað kemur at verða hjá tær, soleiðis sum tað var hjá Paulusi. Tú kemur at fáa neyð fyri menniskjans frelsu. Brøður! Tað er hjartans ynski mítt og bøn til Guðs, at teir mega verða felstir. (Róm. 10,1). Síðani vil eg enda við einum hvítusunnusálmi, sum eg havi yrkt til hvítusunnuna 2002. Gleðiliga hvítusunnu í Jesu navni.

## Hvítusunnusálmur

Lag: hin harða krossin Bf. 45. Dk. 98.

1. Á hvítusunnu Andi Guðs við veldi,
her fylti lærusveinar við tí eldi,
sum tørvast teim, ið tæna Guði vilja,
og ikki sannleiksorðið tá teir dylja.
2. Teir fóru glaðir út í heimin víða,
sum Harrans hermenn teir her vildu stríða;
og vildu kallinum her fegnir fylgja,
um teimum skuldi møta mótgangsbylgja.

3. Tað er ein gleði fyri Guð at stríða,
so nógv Hann fyri okkum vildi líða;
Hann toldi há og spott og sváran deyða,
á Golgata rann blóðið Hans tað reyða.

4. Á páskamorgni sigurin var vunnin,
og hvítusunnan sæla er upprunnin;
nú lærusveinar út við boðum fara,
um ríkið Guðs teir mannaskarar læra.

5. Hann hevur lovað øllum Halgan Anda,
sum vilja stríðast, sjálvt í deyðans vanda;
tað frímóð gevur, Guði lýðin verða,
vit fáa mátt her byrðarnar at bera.

6. Ein dag er skeiðið várt á foldum runnið,
hvør hevur tá her Jesus Kristus funnið?
Og borið gleðiboð um heimin víða,
um Hann, sum vildi fyri okkum stríða.

7. Her ræður um, Guðs kallið lýðin verða,
góð tíðindi til syndarar at bera;
at nú er vegur opin til Guðs ríkið,
við Jesu Kristi náði uttan líkið.

8. Guðs Halgi Andi, kom nú her við veldi,
fyri øll Guðs børn við halgum himnaeldi;
so mannfjøldir Guðs kærleika her skoða,
sum Orð Guðs greitt man okkum øllum boða.



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Nýggjur forsætisráðharri í Suðurkorea



*Fyri fyrstu ferð er ein kvinna vorðin forsætisráðharri í Suðurkorea. Tað hendi í gjár, tá Chang Sang varð sett í embætið. Tað var Kim Dae Jung, forseti, sum tilnevndi hana forsætisráðharra, og eygleiðarar halda, at hetta er ein roynd hjá forsetanum at styrkja støðu sína upp undir forsetavalið í desember*
*Mynd: Reuters*

# Gorbatjov ávarar ímóti nýggjari vápnakappdubbing

**Fyrrverandi russiski leiðarin, Mikhail Gorbatjov, vil hava heimin at vera á varðhaldi. Amerikanska avgerðin at verja seg aftan á atsóknirnar í september í fjør kann enda í einari nýggjari vápnakappdubbing, sigur hann**

VÁPNAKAPPDUBBING
*Árni Joensen*

- Vit mugu skilja, at amerikanski forsetin hevur skyldu til at tryggja tilveruna hjá tjóð síni. Men samstundis eiga vit, sum eru vinir, sameindir og samstarvsfelagar hjá USA, at ávara ímóti einari nýggjari vápnakappdubbing, segði Mikhail Gorbatjov í einum fyrilestri fyri bretskum parlamentslimum mikudagin.

Fyri tveimum mánaðum síðani skrivaðu forsetarnir Vladimir Putin og George W. Bush undir eina avtalu um at skerja talið á kjarnorkuløðingum hjá báðum londunum, men í Russlandi hevur Putin verið fyri atfinningum, tí avtalan loyvir londunum at goyma vápnini heldur enn at oyðileggja tey. Nógvir russar hava eisini fýlst á, at tann 30 ára gamli ABM-sáttmálin er farin úr gildi, tí í Russlandi varð sáttmálin mettur sum tann týdningarmesti liðurin í avdubbingini.

Seinastu árini hevur Mikhail Gorbatjov verið virkin í arbeiðinum at savna penning til at loysa teir ovurstóru umhvørvistrupulleikarnar, sum standast av teimum gomlu sovjetsku vápnagoymslunum við kjarnorkuvápnum, kemiskum og biologiskum vápnum. Í fyrilestrinum fyri teimum bretsku politikarunum nevndi Gorbatjov, at í Russlandi eru 200 kjarnorkukavbátar, sum hava so gamlar og slitnar reaktorar, at tað er neyðugt at gera okkurt.

- Vit stríðast framvegis við avleiðingarnar av teirri gomlu vápnakappdubbingini og eiga ikki at fara undir eina nýggja, segði gamli russiski leiðarin.

# Heimsins dýrasti málningur seldur í London

**Ein higartil ókendur málningur hjá Rubens er nú heimsins dýrasti**

Týskvøldið varð málningurin "The Massacre of the Innocents" seldur á teirri kendu Sotherby-uppboðssøluni í London fyri 49,5 milliónir bretsk pund ella milliónir krónur. Harvið er hann dýrasti málningur, sum nakrantíð er seldur á einari uppboðssølu. Tað gamla metið átti ein málningur hjá van Gogh, sum varð seldur í New York fyri 44 milliónir pund.

Leiðslan í Sotherby-uppboðssøluni hevði væntað at fáa millum fýra og seks milliónir pund fyri málningin, men tá uppboðshaldarin sló hamaran í borðið, var boðið komið upp á 49,5 milliónir pund. Tað var ein privatur savnari, sum keypti.

Málingurin "The Massacre of the Innocents" avmyndar Heródes kong, sum gav boð um at drepa øll nýborin dreingjabørn, so hann á tann hátt kundi beina fyri Jesusi.

Til fyri stuttum hevur verið hildið, at tað var Jan van der Hoecke, sum málaði málningin, men nýliga staðfest Sotherby-serfrøðingurin George Gordon, at tað er Peter Paul Rubens, sum hevur málað hann. Tað gjørdi hann millum 1609 og 1611.

# Fleiri fosturtøkur enn føðingar í Grønlandi

**Hóast umfatandi upplýsingarátøk um fosturtøku og ókeypis fyribyrging eru fosturtøkurnar í Grønlandi fleiri enn føðingarnar**

GRØNLAND
*Árni Joensen*

Ein kanning, sum tríggjar sjúkrasystrar í Grønlandi hava gjørt, vísir, at tað eru bæði ungar og tilkomnar grønlendskar kvinnur, sum fáa fosturtøku, og at talan er um kvinnur úr øllum samfelagsbólkum.

Vanliga hevur talið á føðingum verið størri enn talið á fosturtøkum, men hagtøl fyri 2000 vísa, at tað árið vórðu 887 børn født í Grønlandi, meðan talið á fosturtøkum var 944.

Grønlendski biskupurin, Sofie Petersen, sigur við Kristeligt Dagblad í Danmark, at ein orsøk til tær nógvu fosturtøkurnar er, at so at siga einki orðaskifti er um evnið. Soleiðis er eisini við øðrum grønlendskum trupulleikum so sum sjálvmorðum, sigur hon.

Embætislæknin í Grønlandi, Flemming Stenz, sigur, at einki nýtt er í tí stóra fosturtøkutalinum, og hann heldur, at tær eru ein partur av tilveruni hjá grønlendingum. Embætisløknin sigur, at tær nógvu fosturtøkurnar hava einki við rúsdrekkamisnýtslu at gera, soleiðis sum ofta hevur verið hildið.